

*Nikolina, Óli og Dagmar vóru mammusystkin hjá Gerdu*



*Poul og Gerda á eldri árum*



*Gerda og Poul fingu børnini Edna og Pauli*

pláss umborð at sova. Edna spurdi, um einki pláss var í landi. Nei, tað hevði Jona ikki kannað. Um tað ikki hevði verið uppá pláss at stuðla gistingarhúsum á landi, so tey ikki fóru fyri bakka. Tá fór Jona at flenna. Tað hevði hon als ikki hugsað um. Nei, hon skuldu ikki hava pláss, hon skuldi sova á hotellinum!

Jona var so ótrúliga fitt. Eg havi trígjar ferðir ligið á hvíldarheiminum saman við henni. Vit sótu ofta út á náttina og prátaðu. Hon visti so nógv at greiða frá.

Hon var í hvussu er javnaðarfólk í orðsins rætta týdningi.

## Húsini

Vit hava bygt hetta húsið, sum eg búgvi í. Tá vóru aðrar tíðir. Vit byrjaðu í 1944 at grava út og stoypa. Tað var heilt liðugt í 1947, tá vit giftust og kostaði 23.500 krónur. Tá var tað bæði málað og tapetserað.

Poul doyði í 1996, 73 ára gamal.

Í minningarorðum um hann var millum annað skrivað, at Poul var sera væl dámdur av øllum. Skemtingarsamur var hann altíð. Væl dugdi hann at greiða frá tí, hann hevði upplivað. Tí var tað altíð hugnaligt at koma á tal við hann. Hansara vinsæla og blíða lyndi var mennandi. Við honum var ein býarmynd farin.

Tað kann skoytast uppí, at Poul var kendur sum ein góður málmaður hjá TB. Serliga kendur frá ferðini til Hetlands í 1956, har m.a. Thorolf Dam var við og skrivaði TB-sangin, til minnis um túrin.

## Sigurd mammubeiggi

Eg skal greiða eitt sindur frá systkjunum hjá mammu míni.

Marius Sigurd Petersen var føddur í 1894. Hann var heldur ikki sørur fyri at duga at skriva. Í 1919 og 1920 var hann í Íslandi og róði út. Tá skrivaði hann eina áhugaverda dagbók um lívið umborð.

Sigurd hevði útlongsul, sum nógvir aðrir føroyingar, og hann fór til Canada at fiska við trolara. Hetta var eisini ætlað at vera fyri eitt avmarkað tíðarskeið.

Hann hevði tá eina ferð hitt Dortheu úr Skopun, og tey høvdu eisini dansað saman, meira var ikki hent.

Nú hendir tað, at kona skiparan hjá Hans Marius, beiggja Dortheu, sum eisini var í Canada, var stødd í Bretlandi. Hon var við barn og skuldi koma yvir til hansara. Men skiparin helt tað ikki vera ráðiligt, at konan ferðaðist einsamøll. Hans Marius ráð fekk skipað soleiðis fyri, at Dorthea skuldu vera í fylgi við hesa kvinnu frá Bretlandi til Amerika. Men áðrenn hon fer heim aftur heldur Dorthea, at hon skal fara at vitja beiggja sín Hans Marius uppí Nova Scotia. Her hittur hon aftur Sigurd. Tað rennur saman teirra millum, og tey giftast.

Pauli hevur eisini saman við sínum verið í Canada og vitjað familjuna hjá Sigurd. Tað var ein fantastiskur túrur. Tey vóru 4 dagar í Ottowa 4 dagar Montreal og 4 dagar í Halifax. Canadiska ættin hevur eisini vitjað í Føroyum á ættarstevnum í 2007 og 2008.

## Gunnar Petersen hevði jólatræ fyri grannalagnum

Ein mammubeiggi, sum eg kom at hava serliga góð viðurskifti við, var Gunnar. Hann var bert 12 ár eldri enn eg. Í 1939 giftist hann við Minu, sum bert var 6 ár eldri enn eg. Tey giftust inn í Puntabyrg. Hetta var eitt rættuligt ætttarliðsskifti. Frá at hava havt ommu og abba um meg gjørdist tað nú hetta unga parið. Mina var fantastisk. Hon bleiv faktisk sum ein mamma fyri meg eisini. Eg hevði eitt gott heim hjá teimum, til eg giftist.

Tað eru eisini onnur, sum kunnu vátta, at Mina og Gunnar vóru nakað serligt.

Eilif Lindberg úr Trongisvági greiðir frá, at tá ið hann var barn, var ikki so vanligt við jólatrøum. Men Gunnar og Mina skipaðu fyri jólatræi fyri øllum grannalagnum. Her varð ikki bert dansað um jólatræið. Øll fingu eisini jólagávu. Tey forvandu børnini í dag kunnu als ikki ímynda sær,



*Jón, Katrin, Ina, kona Paula, Rói og Pauli*



*Edna og Árni búgva í Skælingi*

hvussu stórt hetta var fyri eitt barn tá.

Gunnar var føddur 5.3.1910 og andaðist 3.9. 1972. Hann livdi og virkaði í heimbygdini Tvøroyri alt lívið. Aftaná skúlagongdina sigldi hann eina tíð og tókst við ymiskt arbeiði í landi. Tók prógv við handilsskúlan á Tvøroyri við framúr góðum úrsliti í 1936. Hevði síðan ymisk álitisstørv innan sjúkrakassa og annað. Gunnar arbeiddi eisini á havnakontórinum.

Gunnar var skrivari í Froðbiar sóknar javnaðarfelag frá 1929 til sín deyðadag, stjórnarlimur í Fylking 1940-50, eitt skifti formaður. Formaður í Froðbiar Sóknar Sjúkrakassa frá 1959, eisini var hann roknskaparførari. Hann var formaður í Froðbiar sjúkrarøktarfelagi frá 1959. Gunnar var eisini sera ítróttarhugaður og var formaður í TB í 15 ár.

Gunnar var ein av stovnarunum skótaliðsins FLØTT og annars lívgandi í teimum felagsskapum, har hann kom.

Gunnar hevði frálíka skipanarligar gávur og dugdi sera væl at fara við fólki. Hann var felagsmaður burturav.

Gunnar gjørdist fyrstu ferð stjórnarlimur í Føroya Arbeiðarafelag í 1939. Hann var formaður frá 1941 til 1945 og so aftur í 1958 til deyðadag sín. Tá hann doyði varð sagt, tað var ikki minst Gunnar Petersen fyri at takka, at FA stóð so sterkt sum tað gjørdi tá.

Tá ið Gunnar doyði skrivaði D.J. Sørensen minningarorð, har hann m.a. segði:

Gunnar Petersen hevði mong álitisstørv, men har hann gjørdi seg mest kendan var innan fakfelagsrørsluna. Har hevur hann sett djúpari spor eftir seg enn mangir aðrir. Arbeiðararørsluni vígdi hann øll síni evni.

Men ikki bert arbeiðarafelagið Fylking hevði brúk fyri ríku evnum hansara, men eisini Føroya Arbeiðarafelag. Umframt at vera formaður røkti hann eisini skrivarastarvið.

Limur í Froðbiar sóknar líkningarráð var hann eisini eitt valskeið.

Men fakfelagsarbeiðið var vorðið lívsyrki hansara, og hann fylgdi væl við øllum sum livdist og rørdist innan fakfelagsrørsluna í okkara grannalondum.

Gunnarsa størsta ynski var at síggja arbeiðarafeløgini aftur renna saman í óvikandi felagsskap.

Hann hevði í huga tiltøk, sum skuldu skapa arbeiðarum rættindi javnbjóðis øðrum